# Tríggir bjóða av í nýggjari kapping

**Leygarkvøldið verður fyrsta umfar av nýggju tónleikakappingini Singer/songwriter 2003. Kappingin er eitt heilt nýtt fyribrigdi í føroyskum tónleikahøpi, og í fyrsta innleiðandi umfarinum vera tríggir tónleikarar**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*




Leygarkvøldið fara tríggir menn, sum teir fyrstu, at spæla egin løg í kappingini Singer/Songwriter 2003. Hóast altjóða heitið er kappingin føroysk - fyri føroyskar tónasmiðir og sangarar.

Kappingin brýtur upp úr nýggjum. Í hesari kappingini verður dentur lagdur á einstaklingin. Treytin fyri luttøku er, at tann, sum framførir, sjálvur hevur gjørt orð og løg til sangirnar. Orðini skulu vera á føroyskum í tveimum av trimum løgum, og luttakararnir fáa sjálvir loyvi til at velja á hvørjum máli triðja lagið skal syngjast.

## ÚF tekur upp

Tað er Hotel Hafnia, sum hevur tikið stig til kappingina, og tað verður eisini í Hafnia Lounge, at kappingin verður fyriskipað. Umstøðurnar í Hafnia Lounge verða mettar at rigga væl til eina tílíka kapping, har dentur verður lagdur á at skapa ein inniligan og hugnaligan stemning, har tað ikki verður gjørt meira enn vanligt burturúr ljósi og ljóði.

Útvarp Føroya fer eisini at samstarva við Hotel Hafnia í sambandi við kappingina. Útvarpið tekur løgini upp í kappingini.

Fyrsta undanumfarið av trimum fer av bakkastokki leygarkvøldið kl. 21.00, har tríggir luttakarar eru.

## Fuglfirðingur í Havn

Jógvan A. Jacobsen er ættaður úr Fuglafirði, men býr í Havn. Dagligi yrki er bilførari hjá Havnar Timburhandli á Kambsdali. Hann er 23 ára gamal. Kærleikan hevur hann eisini funnið í Havn, og hetta hevur gjørt so stóra ávirkan á hann, at allir tríggir sangirnir hjá honum leygarkvøldið snúgva seg um hansara útvaldu. Hann sigur, at hansara stílur er so friðarligt, sum tað til ber. Jógvan hevur enn einki verið til at geva út, men hann hevur spælt nógv í vertshúsum í høvuðsstaðnum seinastu tíðina.

- Eg hevði viljað havt meira tíð til tónleikin. Royni í løtuni at taka upp heima hjá mær sjálvum til eina møguliga útgávu einaferð, sigur Jógvan, sum heldur at saknur hevur verið á einum tílíkum tiltaki.

## Tónaborin fíggjarstjóri

Niels Juul Arge er 37 ára gamal og starvast til dagligt sum fíggjarstjóri hjá Poul Michelsen heilsølu. Sama sum hjá Jógvani spælir unnustan eisini ein stóran leiklut, tí tað var í hesum førinum hon, sum meldaði Niels Juul til kappingina. Niels Juul sigur, at hann fæst við tónleik til heimabrúk.

- Tá eg las í Århus byrjaði at spæla gittar aftur eftir ein steðg í nógv ár. Tað eru eisini løg frá hesi tíðini, ið eg fari at spæla leygarkvøldið, sigur Niels Juul.

Á fløguni hjá Hans Peturi í Brekkunum hevur Niels Juul skrivað ein tekst, men annars hevur fíggjarleiðarin ikki verið við til nakra útgávu.

## Arbeiðir við útgávu

Ronnie Poulsen er úr Havn og hevur savnað sær fitt av royndum innan tónleikin seinnu árini. Hann hevur luttikið í ymsum bólkum og seinastu tíðina spælt nógv - bæði í bólki og einsamallur - ymsastaðni í Havnini. Ungi havnarmaðurin arbeiðir í løtuni við einari útgávu, sum hann vónar fer at gerast veruleiki innan alt ov langa tíð.

## Vinnarin í studio

Singer/Songwriter kappingin verður skipað við trimum undanumførum. Komandi undankappingarnar verða hildnar 25. oktober og 8. november. Sjálv finalan verður hildin 22. november.

Tað er hvørt kvøld eitt lið av fólki við góðum innliti í tónleik, sum fer at gera av, hvør hin besti singer/-songwriter er.

Vinnarin av samlaðu kappingini fær eisini ein hentan vinning: Tveir upptøkudagar í frálíkum umstøðum hjá Útvarpi Føroya og gávukort frá Hotel Hafnia.

# Norðuratlantshav skal binda fólk og vinnu saman

TÍÐINDASKRIV
*Løgmansskrivstovan*

Onnur Norðuratlantsráðstevnan varð hildin í Hetlandi í døgunum 1. og 2. oktober 2003.

Á ráðstevnuni hittast politikarar, vísindafólk, embætisfólk, vinnulívsfólk o.o úr londum og økjum kring Norðuratlantshav. Høvuðsevnini eru: Burðardygg umsiting av tilfeinginum í havinum og at verja havumhvørvið í Norðuratlantshavi. Harumframt eru onnur evnir um samstarv á skránni.

Luttakarar vóru úr Íslandi, Føroyum, Skotlandi, USA, Hetlandi, Ný Foundlandi og Labrador, Nunavut, Grønlandi, Orkneyoggjum, Hebridunum, Danmark, Svøríki, Finlandi, Noregi og umboð fyri ES-kommisiónina.

Ráðstevnan er íkomin eftir uppskoti frá landsstýrismanninum í Norðurlandamálum, Høgna Hoydal, og saman við Norðurlendska Ráðharraráðnum skipaði Føroya Landsstýri fyri fyrstu ráðstevnuni í Føroyum í 2001. Tá varð gjørd ein yvirlýsing um at londini og økini skulu samstarva um felags ábyrgd fyri Norðuratlantshavi og avrátt varð at ráðstevnan í ár skuldi haldast í Hetlandi.

## Fiskimenn og lokalsamfeløg skulu við í avgerðirnar

Millum høvuðsevnini á ráðstevnuni vóru spurningarnir um, hvussu fiskimenn, vinnan og lokalsamfeløg eiga at takast við í allar vísindaligar kanningar og eiga at hava avgerð og ávirkan á tær reglur og umsitingar, ið verða gjørdar fyri havtilfeingið.

Harafturat varð stór viðgerð av spurninginum um, at tær tjóðirnar og tey samfeløgini sum liva beinleiðis av havinum, eisini eiga at hava ræði á sínum tilfeingi.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður segði m.a. í røðu síni, tá ið ráðstevnan varð sett:

"Alt ov leingi hava vit hugt at okkara Norðuratlansthavi sum eina forðing fyri samstarvi og ein truppulleika fyri at skapa nútímans samfeløg. Alt ov leingi hava vit hugt burtur ella upp um hvørt annað og heldur hugt at tí, vit hava sæð sum miðdeplarnar í Heiminum. Men vit eiga at síggja Norðuratlansthav sum okkara felags grundvøll og sum okkara felags ábyrgd. Vit hava prógvað, at tað ber til at skapa nútímans vælferðarsamfelag grundaði á at gagnnýta livandi tilfeingi í havinum. Men vit mugu samstarva og læra av bæði mistøkum og framtøkum hvør hjá øðrum, um okkara hav og framtíð skal tryggjast."

Høgni Hoydal mælti til, at vinnulívið í londum kring Norðuratlantshav varð eggjað til samstarv og nevndi hugskotið um at skipa eitt "OPEC" fyri fisk Norðuratlansthavi.

Á ráðstevnuni í Hetlandi tóku Høgni Hoydal og Jacob Vestergaard lut sum landsstýrismenn. Hjalti í Jákupsstovu og Birgir Kruse hildu fyrilestrar um ávíkavist føroysku fiskidagaskipanina og mentanarligt samstarv í Norðuratlantshavi. Eisini luttóku Kate Sanderson og Niels á Velbastað, Løgmansskrivstovan, Jacob Pauli Joensen, Heilsufrøðiliga Starvstovan og Ásmundur Guðjónsson, samskipari hjá fiskivinnuroyndum.

## Yvirlýsing samtykt

Eftir ráðstevnuna skrivaðu umboð fyri londini undir eina yvirlýsing, sum leggur dent á m.a.:

- Økt samstarv millum verandi millumlanda stovnar, ið umsita havtilfeingi og verja havumhvørvið í Norðuratlantshavi, til tess at styrkja eina heildarumsiting av havinum sum felags grundarlag okkara
- At fiskimenn, lokalsamfeløg og vinna eiga at takast við í umsiting og avgerðir um havið
- At eggja til samstarv og avtalur millum vinnulívið í Norðuratlantshavi
- At fremja møguleikar fyri økt útbúgvingar- og mentanarsamstarv millum lond og samfeløg í Norðuratlantshavi.

Umboðini fyri tey lond og samfeløg, sum undirskrivaðu yvirlýsingina um samstarv í Norðuratlantshavi tann 2. oktober í Lerwick, Hetlandi: (frá vinstru) Brit Fisknes umboðandi norska fiskimálaráðharran, Svein Ludvigsen; James Sinclair, vararáðsformaður í Orkneyoggjum; Tavish Scott, tinglimur fyri Hetland og vararáðharri fyri fíggjar- og tingmál, Skotland; Siv Friðleifsdóttir, umhvørvismálaráðharri, Ísland; Sandy Cluness, ráðsformaður í Hetlandi; Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógar- og norðurlandamálum; Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Simon Olsen, grønlendski landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum var ikki til staðar men sendi sína undirskrift við fax. Umboðini fyri stjórnirnar í Newfoundland & Labrador og Nunavut (Kanada) høvdu ikki heimild at undirskriva yvirlýsingina á staðnum, men hava mælt til, at tikið verður formliga undir við henni.

## Ráðstevnan fastur táttur

Næsta ráðstevna verður í Noregi í 2005, og tískil bendir alt á at tað hevur eydnast at fingið ráðstevnuna til at gerast ein fastur og týðandi táttur fyri samstarv í Norðuratlantshavi og at hon fer at verða hildin annaðhvørt ár í skiftandi londum. Føroya Landsstýrið hevur bjóðað sær til at samskipa kunning o.a. um ráðstevnuna í samráð við komandi vertslandið.

Vikuskifti
Nr. 193 • leygardagur • 11. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Kannibalisma í Kina

- Eg sat og prátaði við kinesisku Lilly, tá eg fyrstu ferð hoyrdi um kannibalismu av smábørnum. Tað, sum Lilly greiddi frá og tær myndirnar, sum hon vísti mær, førdi mína lívsleið beinleiðis inn á eina journalistiskt læruríka breyt, skrivar Annika B. Mortensen, lesandi í Onglandi

**Lesið síðu 9**



*Petra og Kári Jespersen og dóttirin Elsa vóru og ferðaðust á Goa-strondini í India í vár. Har hittu tey av tilvild Eivind í Gongini, og so hittust tey øll aftur til hansara framsýning í Smiðjuni herfyri*

*Mynd: Jan Müller*

# Petra og Kári hittu Eivind í India

Heilt av tilvild hittu hjúnini Petra og Kári Jespersen Eivind í Gongini niðri á Goa strondini í India, har tey vóru á eini charterferiu. Tey vitjaðu Eivind ein dag í hansara landsbýi, og herfyri hittust tey aftur til hansara framsýning í Smiðjuni í Lítluvík

TILVILD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyrr í vár fóru hjúnini Petra og Kári Jespersen og dóttirin, Elsa, eina charterferð til Goa-strondina í India. Har búði tey á einum góðum hotelli í millum milliónatals av ferðafólkum.

Tann eina dagin tey høvdu verið niðri á strondini, hittu tey ein kendan føroying mest sum av tilvild.

Petra greiðir frá, at meðan tey gingu í millum øll fólkini, sigur Kári, at Eivind í Gongini gongur har.

– Eg sigi tvætl við hann, tí hvørji eru sannlíkindini fyri at hitta hann har millum øll hasi fólkini, sigur Petra.

Men Kári helt upp á sítt og segði, at hansara gongulag líktist nógv føroyskum – við hondunum aftur um bak. Kári rópti so einaferð, og hesin steðgaði og hugdi seg um. Tey settu ferðina upp og heilsaðu upp á hann.

Petra og Kári kendu ikki Eivind frammanundan uttan fyri hansara listarverk.

## Rundferð við Eivind

Eivind í Gongini var bæði blíður og týður. Og hann beyð teimum heim til sín tann eina dagin. Eivind býr í einum lítlum landsbýi, har hvítur maður sjáldan setur sín fót. Ikki tí at fólkið ikki vil hava tey, men heldur tí at hesin lítli býur er ikki millum tey føstu støðini, har ferðafólk vanliga eru, tá tey vitja Goa-strondina.

Hann vísti teimum so runt har, og tey heilsaðu upp á fólkið. Síðani fór hann longur inn í landið við teimum, og har fingu tey sanniliga aðrar síður av India at síggja, enn lívið á Goa-strondini. Tey vitjaðu millum annað á einari Chasewnøtuplantasju, har tey sóu, hvussu saftin varð pressað úr fruktini og nýtt til vín ella brennivín, meðan nøtin sjálv varð nýtt til at eta.

– Nøtin verður bakað, áðrenn ein etur hana, og tað smakkaði avbera væl, sigur Petra.

Petra og Kári vóru sum sagt eisini í heimstaðnum hjá Eivindi í India, og har sóu tey fleiri av hansara málningum. Serliga ein festi seg í minni á teimum, og tey harmaðust um, at tey ikki høvdu keypt ein, tá tey vóru komin heimaftur.

## Keyptu málning

Herfyri sóu tey so lýsing í bløðunum um, at Eivind hevur málningaframsýning í Smiðjuni. Tey gera av at fara at vitja framsýningina. Har hitta tey so á øðrum sinni í ár Eivind, og tey heilsaðust og prátaðu eina løtu.

Málningurin, sum teimum dámdi so væl, hekk uppi í Smiðjuni, og tey smekkaðu til og keyptu hann. Ein málningur við nøkrum oksum á.

Tey bæði fullu fyri honum, serliga orsakað av vøkru litunum. Men eisini tí at motivið var úr India, og tey høvdu roynt at koyra við einum oksavogni harniðri.

Seinni funnu tey so út av, at tað vóru oksar, sum Eivind eigur, sum vóru á málninginum.

Petra sigur, at tey eru sera fegin um málningin, sum tey neyvan høvdu átt, um tey ikki heilt av tilvild hittu Eivind í Gongini niðri á Goa-strondini fyrr í ár.

– Tað er nokk so stuttligt at kunna hitta ein føroying mitt í øllum rokilsinum av øllum fólkunum harniðri. Tað høvdu vit satt at siga ikki væntað, sigur Petra Jespersen at enda.